Uttanríkis- og vinnumálaráðið

28. november 2025
J. nr. 25/21400

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Tórshavn

Svar frá Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu, upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-054/2025 frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni, um reist mál móti sýslumanni og grindaformonnum í sambandi við, at grind er hildin til.

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. *Metir landsstýriskvinnan, at tað er heimild í lógini um djóravælferð at reisa mál ímóti sýslumonnum og grindaformonnum í sambandi við at halda grind til?*
2. *Kann landsstýriskvinnan vátta, at alt, sum snýr seg um grindadráp og aðra veiðu av villini djórum í okkara egna náttúrutilfeingi, er skipað í serstakari føroyskari lóg og reglum, sum ikki kunnu setast til viks av aðrari lóg?*
3. *Hvat ætlar landsstýriskvinnan at gera til tess at tryggja, at útlendskir felagsskapir ikki umvegis ákæruvaldið og løgregluna í Føroyum kunnu reisa mál um avgerðir og fyriskipanir, sum eru heimilað í grindalógini?*

Svarað verður undir einum:
Tað er mín fatan, at grindadráp, sum fer fram eftir reglunum í grindalóggávuni, ikki er í ósamsvari við løgtingslóg um djóravælferð. Tað er somuleiðis mín fatan, at heimild er ikki at reisa ákæru fyri brot á løgtingslóg um djóravælferð, um treytirnar fyri grindadráp, ásettar í grindalóggávuni, annars eru hildnar. Bæði løgtingslóg um djóravælferð og viðmerkingarnar til løgtingslógina stuðla hesi fatan.

Løgtingslóg um djóravælferð hevur til endamáls *at fremja djóravælferð, djóravernd og virðing fyri tomum sum villum djórum*.

Hetta endamál verður fyrst og fremst rokkið við at tryggja, at djór, sum fólk hava á hondum – húsdjór, nyttudjór og kelidjór – verða hildin undir hóskandi umstøðum. Ítøkiliga merkir hetta m.a., at hesi djór skulu hava atgongd til skjól og fóður og vatn, eins og tey skulu hava møguleika at útinna sína natúrligu atferð. Ásetingin merkir eisini, at djórini skulu avlívast á hóskandi hátt. Fyri húsdjór, nyttudjór og kelidjór merkir hetta, at djórini annaðhvørt skulu doyvast, áðrenn tey verða avlívað, ella at tey verða avlívað soleiðis, at tey doyggja beinanvegin. Hetta ber til, tá talan er um djór, sum fólk hava á hondum.

Støðan er ein onnur, tá ið talan er um djór, sum verða veidd, og sum fólk tí ikki hava á hondum. Grindadráp er at meta sum veiða, og hóast grind sum djóraslag er fevnt av

yvirskipaðu meginreglunum í djóravælferðarlógini, so er umráðandi at hava fyri eyga skilnaðin millum ávikavist at veiða vill djór og avlíva tom djór.

Djóravælferðarlógin ásetur í § 13, at *veiða og fiskiveiða skal, alt tað ber til, fremjast á djóravælferðarliga fullgóðan hátt*.

Í viðmerkingunum til løgtingslógina stendur m.a. soleiðis: *Ásett verður, at djór í sambandi við avlíving skulu handfarast soleiðis, at tað er djóravælferðarliga hóskandi. Endamálið er, at avlívingin skal gerast við minst møguligari strongd og pínu fyri djórið, men fyrilit eigur eisini at vera havt fyri tí, sum í royndum letur seg gera. Tá ið talan er um villan fugl, villan fisk og súgdjór, sum liva í náttúruni, t.d. haru og grind, verður hildið, at fiski- og avlívingarhættir, sum verða brúktir í dag, eru í samsvari við ta lóggávu, sum verður skotin upp.* [...]

Djóravælferðin er treytað av tí djóraslagi, talan er um. Greinin snýr seg einans um at veiða og fiska vill djór, og tað er landsstýrismaðurin, ið varðar av hesum øki, ið ásetur nærri reglur. Tað, sum verður mett hóskandi eftir viðkomandi lóggávu, t.e. m.a. fiskivinnu-lóggávuni, grindalóggávuni og lóggávuni um fugla- og haruveiðu, verður vanliga eisini mett hóskandi eftir djóravælferðarlógini.

Tá tað í viðmerkingunum til løgtingslóg um djóravælferð verður sagt, at *fyrilit eigur [...] at vera havt fyri tí, sum í royndum letur seg gera*, so merkir hetta júst tað: Grindadráp, sum verður útint í samsvari við tað, sum er ásett í løgtingslóg og kunngerð um grind og annan smáhval, lýkur ta treyt, sum løgtingslóg um djóravælferð ásetur, nevniliga at drápið skal avgreiðast so skjótt, sum tað ber til, og at hvalurin skal drepast so skjótt og pínuleyst, sum tað ber til, og við fyriliti fyri tí, sum í royndum letur seg gera.

Løgtingslógin um djóravælferð er ein sokallað *lex generalis*, sum ásetur reglur um djóravælferð, um ikki annað er ásett í aðrari lóggávu. Í hesum ítøkiliga føri er onnur lóggáva, sum beinleiðis skipar grindadráp út í æsir, og tann lóggávan – sum er at meta sum *lex specialis* – gongur fram um løgtingslóg um djóravælferð, sbr. vanligu løgfrøðiligu fatanini av lógarhierakinum.

Til spurningin um, hvørt í hesum føri grindalógin kann setast til viks av aðrari lóg, skal stutt viðmerkjast, at ein og hvør kann leggja slíkar spurningar fyri rættin til støðutakan, tí eingin lóg er vard fyri rættarligari roynd.

Í øllum veruligum rættarsamfeløgum er tað ein grundregla, at ein og hvør kann reisa mál um avgerðir og fyriskipanir, sum galda í einum landi. Hetta er eisini galdandi fyri grindalógina, og at nokta fólki, føroyingum sum útlendingum, at boða frá broti á ávísa lóggávu, hevði verið at gjørt seg inn á eina av grundreglunum í einum og hvørjum rættarsamfelagi.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 28. november 2025

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna